## Avboð til U21

Tvær útskiftingar eru í hópinum hjá U21, sum í komandi mánað skal royna seg móti Aserbadjan og Grikkalandi. Pætur Jørgensen og Emil Nolsøe Leifsson, sum í løtuni umboða ávíkavist HB og KÍ verða ikki tøkir hjá venjarunum, Bill Mc. Jacobsen og Heðini Askham. Í teirra stað eru tiknir út Poul N. Poulsen, Skála, og Frank Poulsen, ÍF. Tað skrivar heimasíðan hjá Fótbóltssambandinum.



## Foldgast fingið sáttmála

Tað var eingin dansur á rósum hjá Peter Foldgast, tá hann í summar kom til EB/Streym. Íroknað UEFA-Cup dystirnar móti Manchester City spældi Foldgast við í fimm dystum hjá EB/Streymi, og teir endaðu allir við tapi. Eftir summarsteðgin varð sagt, at danin nú var somikið illa skaddur, at hann og EB/Streymur samdust um at ógylda sáttmálan, men heilt álvarsligur man skaðin tó ikki hava verið. Í øllum førum skrivar bold.dk í dag, at Foldgast hevur skrivað undir sáttmála við FC Vestsjælland, og har fegnast tey í øllum førum um nýggja spælaran, sigst.

HB-B71:

## Stendur nógv á

**Í HB eru silvurmerkini aftur í eygsjón, meðan tað hjá sandoyingum skjótt er akuttur stigamangul**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast HB á stigatalvuni er nakað langt framman fyri B71, so verður talan neyvan um lætta uppgávu hjá siðvanda havnarfelagnum.

Sandoyingar vóru annars fyri viku síðani í fullari ferð við at vinna seg úr botninum, men tvey tap á rað bera við sær, at trýstið á teimum nú er heilt stórt.

Tí skulu stig helst á kontina nú, og so er tað líkamikið, um mótstøðuliðið eitur HB í Gundadali ella okkurt heilt annað.

Til dystin hevur Eli Hentze allar sínar mans tøkar, og so er spurningurin, um hann blandar kortini øðrvísi, enn hann gjørdi í Runavík í miðvikuni.

Hjá HB er Fróði Benjaminsen framvegis ikki tøkur, men roknað verður við, at hann kann byrja venjingina aftur, meðan landsliðssteðgur verður eftir hetta umfarið.

Hinvegin er Milan Kuljic aftur tøkur, eftir at hann hevur sitið leikbann av sær, og so er spurningurin, um venjararnir velja at halda fram við liðnu, sum vann seinast, ella um Ólavur í Ólavsstovu noyðist at víkja fyri Kuljic.

EB/Streymur-B68:

# Hagtalsligur samanbrestur

**B68, sum eigur bestu útivallarúrslitini av øllum, fer hesa ferð at vitja toppliðið, sum higartil hevur vunnið fulla úrtøku á heimavølli**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Toftamenn eiga besta útiliðið í Formula-deildini. Men um tað er nóg mikið móti EB/Streymi við Margáir er so ein heilt onnur søga*

EB/Streymur er oddalið, sum hevur beina kós ímóti fyrsta FM heitinum. Oddasessurin er ikki minst vunnin orsaka av góðu úrslitunum á heimavølli. Higartil hevur toppliðið spælt níggju ferðir á heimavølli í ár, og tað hevur skorist ógvuliga væl. Liðið hevur vunnið fulla úrtøku, og samantaldi málmunurin hjá EB/Streymi við Margáir er 26-8.

B68 hevur seinastu vikurnar støðugt tikið seg burtur frá hóttanini av niðurflyting. Tað kemst serliga av góðu avrikunum á útivølli. 1-0 sigurin í Gøtu mikukvøldið var sætta ferðin í ár, at toftamenn vunnu fulla úrtøku á útivølli. So nógvar útivallar sigrar hevur einki annað lið vunnið.

Tað vil við øðrum orðum siga, at nú eru tað besta heimaliðið og besta útivallarliðið, sum bresta saman í Streymnesi.

Hjá B68 vóru veteranarnir Øssur Hansen og Arnbjørn Danielsen ikki á liðnum mikukvøldið. Teir hava síðani summarsteðgin verið sera drúgvir á vongverjunum. Øssur Hansen var skaddur, og Arnbjørn Danielsen var leikbannaður. Arnbjørn verður á liðnum sunnudagin. Á Toftum verður vónað, at Øssur Hansen eisini verður tøkur, men í dag ivaðust teir í, um hann verður førur fyri at spæla.

Eftir fulla úrtøku tvær tær seinastu ferðirnar er fótbóltslagið sera gott í Sundalagnum, har tað verður tosað um lítið annað enn fótbólt og vánirnar fyri at vinna fyrsta FM heitið.

Oddaliðið er væl trimmað, og manningarliga stendur tað heilt væl til. Tann einasti av teimum, sum plaga at vera ímillum teir fyrstu ellivu, sum ikki var á liðnum ímóti KÍ, var málverjin René Tórgarð. Gunnar á Steig hevur tvær tær seinastu ferðirnar verið álitisfullur millum stólparnar.

Tá ið B68 13. apríl í 3. umfari vitjaði EB/Streym, var tað heimaliðið sum streyk avstað við øllum stigunum. EB/Streymur vann ta ferðina 3-1 á toftamonnum.

NSÍ-ÍF

# Minnini eru heilt dramatisk

**Bæði liðini eru væl fyri, tá ið ÍF fer at vitja við Løkin, har fuglfirðingar og NSÍ fyrr í ár vóru partar av eini tí mest dramatisku uppgerðini higartil**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá ið ÍF fer at vitja NSÍ munnu minnini frá mest dramatisku uppgerðini higartil í ár kveikjast hjá teimum, sum vóru eygnavitni, tá ið NSÍ í 5. umfari, sum var á skránni 30. apríl, vann 3-2 á heimavølli ímóti ÍF. Dramatikkurin var serliga stórur síðstu løtuna, tá ið bæði liðini skoraðu, tá ið reyða kortið var á lofti, og tá ið ÍF í yvirtíðini misnýtti brotsspark.

Tað er felags fyri bæði feløgini, at tey hesa seinastu tíðina hava havt undanvind. NSÍ hevur vunnið seg fram á silvurplássið, og ÍF hevur vunnið seg burtur frá størsta vandanum fyri at missa plássið í bestu deildini. At fuglfirðingar mikukvøldið megnaðu fulla úrtøku ímóti B36 hevur sjálvsagt styrkt um sjálvsálitið.

Undan oyggjauppgerðini eru bæði feløgini eisini manningarliga væl fyri. Hjá NSÍ er Jóhan Troest Davidsen tøkur aftur, eftir at hann mikukvøldið sat leikbannið av sær, sum útvísingin á Toftum sunnudagin var orsøk til. Allir hinir spælararnir eru tøkir. Eisini Øssur Dalbúð, sum endaði á skaðastovuni á Landssjúkrahúsinum mikukvøldið.

Jens Joensen var vinstri vongverji mikukvøldið. Tað plássið fer Aco Pandurovic at røkja sunnudagin, tá ið Jóhan Troest Davidsen aftur verður undir liðini á Óla Hansen í miðverjuni.

Hjá ÍF fegnast Albert Ellefsen og spælararnir um fyrsta sigurin síðani venjaraskiftið. Tað er kapping um plássini. Áki Petersen og Jonn Thomsen hava verið uttanfyri í fleiri umfør. Mikukvøldið var tað Knút



Vesturtún, sum røkti miðverjuplássið undir liðini á Bartali Eliasen.